# Van der Vaart til Real Madrid

Hollendska leikarainnrásin í Real Madrid heldur fram. Real Madrid hevur í dag ognað sær Rafael van der Vaart úr Hamburger SV fyri góðar 150 milliónir krónur. Van der Vaart, sum hevur verið lyklaleikarin og liðskiparin hjá týska Hamburger SV seinastu trý kappingarárini, hevur skrivað undir ein fimm ára sáttmála við Real Madrid. Van der Vaart er uppaldur í Ajax Amsterdam, og hollendska felagið fær eisini ein stóran part av søluupphæddini. Í dag kom eisini fram, at Real Madrid má vera Wesley Sneijder fyri uttan í nakrar mánaðir. Hann hevur slitið liðbandið, og um krossbandið eisini hevur fingið skaða, so kann tað væntast, at Wesley Sneijder verður uttanfyri vøllin í eitt hálvt ár.



# Reyes til Portugal

Jose Antonio Reyes var fyri árum síðan skýrdur at eiga eina sera bjarta fótbóltsframtíð. Dugnaligu bóltevnini rukku tó ongantíð so langt sum væntað, og eftir ár í Arsenal, Real Madrid og Atletico Madrid vendir spaniumaðurin nú nøsini móti Portugal. Hann gjørdi fyrrapartin avtalu við Benfica, har hann ætlandi skal spæla komandi árini. Nýggi venjarin hjá Benfica, Quique Flores, hevur av álvara gjørt sum seg á leikaramarknaðinum í summar, og Reyes er saman við átta øðrum tilgongdin hjá felagnum.

HB – Víkingur:

# HB við nýggjari manning

**HB hevur mist tveir landsliðsleikarar í steðginum, og Víkingar hava tapt báðar dystirnar, teir hava spælt í Gundadali higartil í ár**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað gekk væl hjá nýggja eysturoyarliðnum áðrenn summarsteðgin. Tríggir sigrar á rað høvdu við sær, at felagið kundi halda feriu á einum fjórða plássi – bert trý stig frá øðrum plássi. Hinvegin hevur felagið tapt tilsamans seks stig, tá teir hava verið í Gundadali í ár. Tvær ferðir hava teir vitja í høvuðsstaðnum, og báðar ferðir hevur liðið tapt. Mótstøðuliðið hevur tá verið B36. Hesaferð eitur tað HB. Enn er ov tíðliga at tosa um eitt Gundadal kompleks hjá Víkingi, men ein sannroynd er, at siðvenjan hjá gamla GÍ-liðnum var nakað betri enn tað, Víkingur higartil hevur víst móti høvuðsstaðarfeløgunum.



### Erling Jacobsen verður við

– Hetta er eitt nýtt lið og eitt nýtt felag, vit eru við at byggja upp, men sjálvandi fara vit eftir trimum stigum, sigur Anton Skoradal fullgreiður um, at uppgávan í annaðkvøld verður trupul.

Tí kemur tað væl við, at hann hevur so at siga alt fólki tókt. Sverri Jacobsen er langtíðarskaddur, men allir hinir sum hava vant við seinastu tíðina, eru tøkir. Eisini Erling Jacobsen, sum annars umboðar FC Amager, er partur av hópinum. Hann er heima í summarfrí og verður eisini við til dystin sunnudagin, men so fer hann av landinum aftur.

### Broytt HB lið

Í sigursvanda høvuðsstaðarfelagnum hevur verið stór útskifting í steðginum. Christian Høgni Jacobsen er skiftur til AB í Danmark, meðan Jákup á Borg og Tróndur Vatnhamar tørna nú til fyri B36.

Hinvegin hevur HB fingið nógv, gott og ungt fólk í steðginum. Brøðurnir Mouritsen, Johan Ejvind og Christian, eru komnir til, umframt at Hendrik Rubbeksen er tøkur aftur. Rókur av Fløtum Jespersen er komin aftur úr Danmark, og Svenn F. Nolsøe skiftur til barndómsfelagið aftur frá B36.

Stórar útskiftingar, sum koma at merkja liðið, viðgongur Rúni Nolsøe, venjari hjá HB. – Útskiftingarnar í hópinum leggja upp til broytingar, sigur hann, men vil ikki koma nærri inn á, hvussu hetta fer at merkja liðið.

Hann veit heldur ikki heilt enn, um hann kann rokna við øllum monnum. Hetta tí, at Johan Ejvind Mouritsen, sum er komin aftur úr TB, har hann hevur gjørt seg til toppskjútta í 1. deild, hevur trupulleikar við rygginum.

# Rógvi verður við frá byrjan

**Heimvendi Rógvi Jacobsen verður eftir øllum at døma við frá byrjan, tá KÍ skal royna at vinna seg endaliga úr botninum**

UPPTAKT
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Klaksvíkingar eru aftur bjartskygdir. Áskoðararnir stórliga fegnast um tilgongdina av Rógva Jacobsen, sum hava sett sítt alít á landsliðsleikaran, sum ætlandi skal skjóta KÍ upp eftir stigatalvuni. Langlímaði framherjin kann byrja málskjótingina í morgin, tá hann eftir øllum at døma verður við frá byrjan, tá toftamenn vitja á Injector Arena. Hetta verður helst saman við Rodrigo Silva.

Tað er trýst á klaksvíkingum í morgin. Eydnaðst tað ikki at fáa stig, so er liðið aftur í niðurflytingarvanda. Og tað hevði verið ein lítið hugalig støða í Klaksvík.

Eyðun Klakstein, venjari, hevur aftur liðformannin í Heðin á Lakjuni og verjuleikaran Jan Andreasen at ráða yvir. Teir vóru leikbannaðir seinast. Somuleiðis er Bjarni Jørgensen klárur aftur eftir drúgvan skaða, sum hevur hildið hann uttan fyri síðan triðja umfar. John Hammer og Kristian á Lakjuni verða ikki tøkir vegna skaða.

Tað var í tøkum tíma, at summarsteðgurin kom hjá toftamonnum. Tað hevur gingið alt annað enn væl seinastu vikurnar, har teir hava tapt móti Skála, HB og B71. Nú vónar felagið, at liðið er styrkt við Pól Johannus Justinussen, Jann Martin Mortensen og dananum Brian Andrésen. Hesir verða fyri fyrstu ferð í B68-búnanum í morgin.

Badara Diedhiou verður ikki við í Klaksvík í annaðkvøld. Hann er leikbannaður. Bill McLeod Jacobsen, venjari, má eisini verða langtíðarskaddu Jóan Petur Poulsen og Landing fyri uttan.

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 14 | 10 | - | 2 | - | 2 | 29 | 15 | 14 | 32 |
| 2 HB | 14 | 7 | - | 4 | - | 3 | 29 | 11 | 18 | 25 |
| 3 NSÍ | 14 | 7 | - | 3 | - | 4 | 22 | 17 | 5 | 24 |
| 4 Víkingur | 14 | 6 | - | 3 | - | 5 | 23 | 16 | 7 | 21 |
| 5 B36 | 14 | 5 | - | 6 | - | 3 | 16 | 11 | 5 | 21 |
| 6 KÍ | 14 | 4 | - | 5 | - | 5 | 18 | 22 | -4 | 17 |
| 7 ÍF | 14 | 5 | - | 2 | - | 7 | 18 | 25 | -7 | 17 |
| 8 B68 | 14 | 4 | - | 2 | - | 8 | 9 | 24 | -15 | 14 |
| 9 Skála | 14 | 2 | - | 5 | - | 7 | 10 | 21 | -11 | 11 |
| 10 B71 | 14 | 3 | - | 2 | - | 9 | 14 | 26 | -12 | 11 |

**1. deild**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB/S | 15 | 12 | - | 1 | - | 2 | 39 | 12 | 27 | 37 |
| 2 07 Vestur | 14 | 11 | - | 1 | - | 2 | 60 | 21 | 39 | 34 |
| 3 AB | 14 | 10 | - | 1 | - | 3 | 50 | 18 | 32 | 31 |
| 4 TB | 16 | 9 | - | 2 | - | 5 | 43 | 15 | 28 | 29 |
| 5 HB | 13 | 4 | - | 4 | - | 5 | 20 | 14 | 6 | 16 |
| 6 Víkingur | 14 | 4 | - | 3 | - | 7 | 18 | 39 | -21 | 15 |
| 7 NSÍ | 15 | 3 | - | 4 | - | 8 | 30 | 43 | -13 | 13 |
| 8 KÍ | 13 | 4 | - | 1 | - | 8 | 18 | 45 | -27 | 13 |
| 9 EB/S | 14 | 3 | - | 0 | - | 11 | 13 | 60 | -47 | 9 |
| 10 B68 | 14 | 2 | - | 1 | - | 11 | 18 | 42 | -24 | 7 |

B71 – B36:

# B71 móti yvirvaldinum



**Gudmund Nielsen verður ikki við, tá B71 tekur ímóti einum nógv styrktum B36 liðið, sum kortini vantar týdningarmiklar leikarar**

UPPTAKT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

B71 hevur 14 stig. Níggju av hesum vunnu sandoyingar í trimum teimum síðstu dystinum, áðrenn farið var í summarfrí. Nú er ferian av og menn skulu aftur á vøllin. Allir uttan Gudmund Nielsen, sum ikki far spælt, tí hann hevur fingið bruna í eitt sár. Hetta kemur ógvuliga dátt við sandoyingum. Hinvegin eru hinir eins og hann vanir at stríðast, og tað fara teir sjálvsagt eisini at gera, nú nógv styrkta B36-liðið kemur á vitjan.

### Súni Olsen skaddur

Jákup á Borg og Tróndur Vatnhamar skiftu í steðginum til B36 frá HB. Hesir vera uttan iva at síggja í hópinum í annaðkvøld. Alt annað hevði verið undarligt. Serliga tá havt verður í huga, at Súni Olsen ikki verður við. Hann hevur framvegis trupulleikar við fótinum.

Og so er tað eisini ivasamt við Inga Højsted. Hann kom á vøllin móti Brøndby, spældi væl og vandi eisini við í gjárkvøldi. Hann var tó noyddur at gevast, og tískil er ógreitt hvussu verður við honum. Sostatt kann B36 standa og vanta tveir av lyklaleikarunum á sentrala miðvøllinum.

Hetta broytir tó einki upp á tann veruleika, at B36 er stórfavorittur til at vinna dystin.